FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

# Dagførd inntøkumeting til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2025

## Inngangur

Fíggjarmálaráðið hevur gjørt dagførdar metingar av inntøkujáttanunum, nú í desember í mun til september, tá fíggjarlógaruppskotið varð lagt fram. Niðanfyri verður greitt frá teimum inntøkujáttanum, sum Fíggjarmálaráðið metir fara at víkja frá fíggjarlógaruppskotinum fyri 2025, í mun til galdandi lóggávu. Samanlagt er talan um minniinntøkur á 30 mió. kr. samanborið við fíggjarlógaruppskotið.

| Grein | Konta | Høvuðskonta | sep 24 | Nýggj meting | des 24 |
|---|---|---|---|---|---|
| 20 | 52101 | Vanligur landsskattur (Ógreinað j.) | 2.140.000 | 0 | 2.140.000 |
| 20 | 52111 | Kapitalvinningsskattur (Ógreinað j.) | 415.000 | -15.000 | 400.000 |
| 20 | 52201 | Meirvirðisgjald (Ógreinað j.) | 2.195.000 | -15.000 | 2.180.000 |
| 20 | 52213 | Brennioljugjald (Ógreinað j.) | 146.000 | -10.000 | 136.000 |
| 20 | 52215 | Avgjald á fiskatilfeingi (Ógreinað j.) | 464.800 | -7.000 | 457.800 |
| 20 | 52304 | Útluting frá partafeløgum og grunnum (Ógreinað j.) | 130.000 | 27.000 | 157.000 |
| 20 | 52501 | Endurrindan av keyps-MVG (Ógreinað j.) | -315.000 | -10.000 | -325.000 |
| | | | | **-30.000** | |

## Dagførd inntøkumeting

### Vanligur landsskattur

Dagførd meting er, at inntøkurnar frá vanligum landsskatti verða, sum mett í fíggjarlógaruppskotinum.

Inntøkurnar fyri 2024 verða mettar til 2.135 mió. kr. Henda upphæddin er síðani framskrivað við 95 mió. kr., sum svarar til góð 4%. Skattaumskipanin og broyttur linkingarháttur hava við sær umleið 90 mió. kr. minni í skattainntøkum. Samanlagt gevur tað 2.140 mió. kr.

### Kapitalvinningsskattur

Dagførd meting er, at inntøkurnar frá kapitalvinningsskatti verða 15 mió. kr. lægri í 2025, enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2024 og fráboðan frá Føroya Banka um útluting av vinningsbýti í 2025.

### Meirvirðisgjald

Dagførd meting er, at meirvirðisgjaldið verður 15 mió. kr. lægri í 2025, enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2024.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Brennioljugjald**
Dagførd meting er, at inntøkurnar frá brennioljugjaldi verða 10 mió. kr. lægri í 2025, enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2024.

**Avgjald á fiskatilfeingi**
Dagførd meting er, at inntøkurnar frá avgjaldi á fiskatilfeingi verða 7 mió. kr. lægri í 2025, enn mett í fíggjarlógaruppskotinum.

Dagførd meting er, at samlaðu inntøkurnar frá avgjaldi á fiskatilfeingi eru 440 mió. kr. Tað er 50 mió. kr. minni enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Av hesum verða 1 mió. kr. minni til kommunurnar. Av tí at tilfeingisinntøkurnar frá fiskivinnuni eru oman fyri markið fyri tí, sum skal verða flutt í Búskapargrunnin, verður upphæddin, sum verður flutt í grunnin minni við 49 mió. kr. Upphæddin verður flutt úr Búskapargrunninum yvir 7 ár. Tí verður tilfeingisinntøkan í fíggjarlógini 7 mió. kr. minni í 2025.

Í mun til metingina í fíggjarlógaruppskotinum verða kvoturnar fyri 2025 sum heild lægri, meðan høgu prísirnir á makreli, sild og botnfiski í 2024 hava við sær hægri avgjald. Samlað er talan um 20 mió. kr. í meirinntøkum.

Lága kvotan av makreli í 2025 hevur við sær, at sambært galdandi veiðigjaldslóg skal veiðigjaldið verða lækkað við 50%, um tøka kvotan fer niður um 50% í mun til miðal seinastu 5 árini. Avslátturin merkir, at veiðigjaldið á makrel minkar um 70 mió. kr. Lógaruppskot verður eftir ætlan lagt fyri Løgtingið í desember um at strika avslátturin fyri makrel í 2025.

Havast skal í huga, at metingin byggir á, at Føroyar áseta sær sama prosent av kvotuni av norðhavssild og svartkjafti. Verður semja millum strandalondini um hesi fiskasløgini, og at kvotan tí minkar, kann roknast við, at veiðigjaldsinntøkurnar frá hesum fiskasløgum minkar.

**Útluting frá partafeløgum og grunnum**
Dagførd meting er, at inntøkurnar frá útluting frá partafeløgum og grunnum verða 27 mió. kr. hægri í 2025, enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í vinnulívinum í 2024 og fráboðan frá Føroya Banka um útluting av vinningsbýti í 2025.

**Endurrindan av keyps-MVG**
Dagførd meting er, at útreiðslurnar til endurrindan av keyps-MVG verða 10 mió. kr. hægri í 2025, enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Grundarlagið fyri metingini er gongdin í 2024 og metta løgunýtslan í 2025.

Tinganes, 4. desember 2024

**Ruth Vang**
Landsstýriskvinna

/ **Bjarni Askham Bjarnason**